Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Ingolf Sólheim Olsen, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard. landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Evni: Fiskirættindi í bólki 3

Spurningar:

1. Hvørji skip hava veiðiloyvi í bólki 3 (í mars 2021)?
2. Hvørji skip høvdu hesi loyvi í 2009?
3. Hvør er søgan hjá tí einstaka veiðiloyvinum síðan 2009:
    a. Hvørji skip hava havt tey einstøku veiðiloyvini síðan 2009?
    b. Hvussu nógvir fiskidagar hava verið knýttir at teimum einstøku veiðiloyvunum hvørt árið síðan 2009?
4. Í hvørji løgtingslóg hevur Løgtingið samtykt, at óvirkin og tóm veiðiloyvi, ið hoyra til óvirkin skip, hava sama status sum virkin veiðiloyvi, sum hoyra til virkin skip, tá tað um rættindi ræður?
5. Hvørji saklig og viðkomandi atlit liggja til grund fyri at útluta fiskirættindi til tóm veiðiloyvi, sum hoyra til óvirkin skip?

Viðmerkingar:
Soleiðis sum Fiskimálaráðið hevur umsitið og fyrisitið fiskirættindi seinastu árini, so tykist tað at vera eitt endamál í sjálvum sær hjá feløgum at eiga skip (helst fleiri) við veiðiloyvi, sama um vinnuliga grundarlagið endaliga er vorðið avhendað øðrum.

Tóm veiðiloyvi og óvirkin skip hava seinastu árini virkað sum móttøku- og steðgistað av fiskirættindum, sum landsstýrismaðurin útlutar, men við tí endamáli, at hesi verða víðari-umsettt til onnur at gagnnýta.

Í hesum førinum verður hildið fast um hesa fyrisiting, hóast fleiri av virknu feløgunum í bólkinum – bólki 3 – stríðast við at flóta omaná fíggjarliga.
Ein trupulleiki við hesi fyrisiting er, at trupult er at fáa eyga á, í hvørji lóg ella í hvørjum meginreglum hesin leistur er vorðin grundfestur.

Hvørki veiðiloyviskunngerðin frá 1993 ella lógin um vinnuligan fiskiskap frá 1994 er galdandi, men einki í nýggju lógunum frá 2017 og 2019 bendir á, at meginreglurnar fyri at *fyriskipa skynsama nýtslu av veiðirættindum, sum eru tøk uttan fyri landleiðirnar,* ikki eru galdandi.
Í veiðiloyviskunngerðunum frá bæði 1987 (kunngerð nr. 35 frá 5. mai 1987) og 1993 (kunngerð nr. 54 frá 26. mars 1993) varð staðfest, at endamálið við veiðiloyvum var ávikavist at*:*

- *fyriskipa veiðiorkuna og harvið veiðitrýstið á fiskastovnarnar á landleiðunum*
- *og at loyva skynsama nýtslu av teimum veiðirættindum, sum eru tøk uttan fyri landleiðirnar*

§ 29, stk. 2 í upprunalógini ásetti:
Í fyrsta umfari verður ikki kvota ella kvotapartur tillutaður fiskifari, sum ikki er í vinnu ella møguliga ikki fer í vinnu fyribils. Er vissa fyri, at farið kemur í vinnu rímiligan part av fyrsta fiskiári, útskrivar landsstýrið kvotabrøv. Kvota ella partar av kvotu soleiðis ónýtt fellur til hini

førini í avvarðandi høvuðsbólki. Henda regla ávirkar ikki fríu umsetiligheitina smb. § 16 annars, tá kvotabræv endaliga er útskrivað.

Tað kann vera ivasamt, nær upprunaliga ætlanin við óvirknum rættindum mótvegis virknum rættindum er snarað 180 stig.

Nú verða áður tømd veiðiloyvi aftur gjørd virkin í eini skipan við umsetiligum rættindum. Tømd veiðiloyvi og løgd skip verða javnsett við virkin feløg og skip. Hesi kunnu nú seljast til onnur – hesa ferð við støði í vinnuliga óvirknum veiðiloyvum.

Tað kann eisini vera ivasamt, um hetta er í samsvari við upprunaligu meginreglurnar um skynsama nýtslu av tøkum rættindum.

Á Løgtingi 26. mars 2021

Ingolf S. Olsen